


## Nógv kunnu missa arbeiðið

Kemur ikki gongd á donsku ídnaðarframleiðsluna skjótt, kann tað væl henda, at danskar ídnaðarfyritøkur fara at siga fólki upp og tað í stórum tali. Tað er í hvussu er forsøgnin hjá tí stóra bankanum Nordea. Helge Pedersen, sum er leiðandi búskaparfrøðingur hjá bankanum, sigur við Børsen, at í løtuni er framleiðslan hjá danska ídnaðinum so lítil, at kemur ikki ein vend í skjótt, noyðast fyritøkurnar at koyra knappliga 50.000 fólk til hús. Norea væntar, at 130.000 danir eru arbeiðsleysir, tá hetta árið endar, og at talið kemur upp á 175.000, tá næsta ár endar.

# Norðborg er sektað fyri at hava tikið ov lítið úr tilfeinginum

**- Vit eru vónsviknir av, at Norðborg fekk so lítið í sín part í svartkjaftabýtinum. Vóru tað ikki somu eigarar, sum áttu Christian í Grótinum og Norðborg, hevði ikki sæð væl út í dag, nú vit eru komnir við nýggjum verksmiðjuskipi. Norðborg hevur verið framleiðsluskip og hevur soleiðis roynt at fingið sum mest burtur úr tilfeinginum. Tí hava vit fiskað lutfalsliga minni nøgdir enn onnur skip. Hetta eru vit sektaðir fyri í verandi býti, og tað halda vit er skeivt, sigur Kristian Martin Rasmussen, reiðari**



*Skipað varð fyri stórfingnari móttøku og hátíðarhaldi, tá nýggja Norðborg kom á Klaksvík dýra biðidag. Kristian Martin Rasmussen, reiðari og Gunvá við Keldu, borgarstjóri, bæði í føroyskum búna*

*Mynd: Dávur Winther*



**PRÁT**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Kristian Martin Rasmussen, sum júst er fyltur 62 ár, sigur, at teir hava møtt nógvum fólki, síðan teir komu heim úr Chili við nýggju Norðborg, sum hava heilsað teimum og ynskt teimum tillukku við stásiliga nýbygninginum.

- Jú, eg haldi, at fólk eru ógvuliga positiv, og eg ivist onga løtu í, at hetta lyftir eitt sindur undir, nú Klaksvíkin beint í løtuni ikki hevur sínar allar bestu dagar. Tað kann taka nakað av tí, men gongdin fer at venda. Líka so dapurskygd, sum fólk kunnu vera í dag, tá vinnuligu vánirnar ikki eru tær bestu, líka so positiv eru tey aftur, tá tað fer at ganga betri.

### 2-3 vikur

Kristian Martin sigur, at teir gjørdu av at sigla skipið heim úr Chili og fáa seinastu instalatiónirnar gjørdar her heima, tá tað dró út at fáa skipið liðugt á skipasmiðjuni har yviri.

- Tað er fitt av arbeiðið, sum skal gerast aftrat. Vit kundu fingið hálendingar og norðmenn, sum standa fyri største partinum av verksmiðjuni, yvir til Chili, men vit hildu tað vera lættari, um teir bara komu til Føroya at gera tað, ið eftir er.

Hann sigur, at øll veitingin útyvir sjálvt skipið kemur úr Evropu, og tí væntaðu teir at spara nakað av tíð, nú hesi arbeiði verða gjørd, meðan skipið er í Føroyum.

- Føroyska fyritøkan formula.fo hevur eisini eina nakso stóra uppgávu umborð á Norðborg. Fyritøkan kemur nevniliga at taka sær av vektarskipan, merking av vøru og eitt nú sporføri. Tað hevur alla tíðina verið ætlanin, at formula.fo skuldi taka sær av hesum, sigur hann.

Men eitt er at fáa allar skipanir settar upp. Annað er, at tær eisini skulu royndarkoyrast.

- Eg vænti, at einir átta útlendingar verða við okkum á fyrsta túri. Hetta eru fólk, sum umboða veitarar av útbúnaði. Teir koma soleiðis at fylgja við, hvussu eitt nú filét-linjurnar koyra, mjølverksmiðjan og frystingin.

Kristian Martin væntar, at tað fer at taka einar 2-3 vikur, áðrenn Norðborg loysir á fyrsta túrin.

- Vit vóna, at vit ikki koma alt ov seint í gongd, soleiðis at vit fáa høvi at byrja við svartkjaftinum. Tá noyðast vit ikki so langan veg, um okkurt skuldi verið, sum vit noyðast til lands eftir – ella at gera. Tað hevði soleiðis verið høgligari, um royndarkoyringin fór fram, meðan vit eru á svartkjaftaveiði um okkara leiðir, sigur hann.

Skerimasminurnar umboð á Norðborg eru av slagnum VMK. Hetta eru maskinur, sum hava roynst væl gjøgnum fleiri ár. Upprunaliga vóru hetta sildamaskinur, sum síðan eru bygdar til eisini at skera svartkjaft. Longu í 1986, tá svartkjaftaskipið Andrias í Hvannasundi kom sum nýbygningur, vóru skerimaskinurnar av hesum slag.

### Reiðskapur klárur

Sjálvur veiðireiðskapurin liggur klárur, og lemmarnir eru teir somu, sum vóru umborð á Christiani í Grótinum.

- Vit fara at brúka hesar lemmarnar fyrst, meðan bíðað verður eftir nýggjum lemmum, sum Injector arbeiðir við. Trolini vera av sama slagi, sum tey, vit høvdu umborð á Christiani í Grótinum. Sniðini eru tey somu og støddin eisini. Helst fara vit at hava okkurt av teimum gomlu trolunum at taka til.

Kristian Martin sigur, at tað verða synirnir, Jón og Bogi, sum fara at skiftast um at føra nýggju Norðborg, meðan triði sonurin, Eyðun, er virkandi stjóri á skrivstovuni.

- Vit fara tó allir við á fyrsta túrin, og tá alt fer at rigga, sum tað skal, fara Jón og Bogi at skiftast um brúnna, leggur hann aftrat.

Herfyri segði annar av synunum hjá Kristian Martini við Sosialin, at hin "gamli" ivaleyst eisini man fara at føra Norðborg onkran túrin, tí hesin legst neyvan uppi permanent við góðum.

- Eg vænti tó, at eg so spakuliga fari at detta niðurímillum, sum tíðin gongur, sigur Kristian Martin broslandi.

Hann tekur tó aftur íaftur og heldur fyri, at enn er hann í góðum árum.

- Eg kann vera tann, sum tosar við fjølmiðlarnar – menn, sum teg, sigur hann aftur og flennur.

### Lodnan spennandi

Kristian Martin sigur, at eitt, sum teir eru sera spentir upp á fyri framman, er lodnan, sum nú er við at koma fyri seg aftur í Barentshavinum.

- Í ár kundu vit ikki fáa lut í lodnuni, men eg vóni,